## Einki prát við útlendskar fjølmiðlar

Íslendski forsætisráðharrin, Jóhanna Sigurðardóttir, ætlar sær ikki at tosa við útlendskar fjølmiðlar fyrr enn dagin eftir altingsvalið. Sambært íslendskum fjølmiðlum hava umboð fyri amerikonsku tíðindastovuna AP og arabiska sjónvarpið Al Jazeera biðið um samrøðu við forsætisráðharran, men uttan úrslit. Grundgevingin sigst vera, at forsætisráðharrin hevur so nógv at gera. Andstøðan í Altinginum hevur leingi funnist at støðu forsætisráðharrans mótvegis fjølmiðlunum. Harafturat verður tað hildið vera ein veikleiki, at hon er ikki serliga stinn í enskum máli.



## Ikki drápsmaður kortini

Sviin Thomas Quick, sum er dømdur fyri at hava beint fyri átta fólkum, sigur seg nú vera ósekan. Verji hansara sigur, at Thomas Quick var illa fyri sálarliga orsakað av rúsevnamisnýtslu, tá hann bleiv avhoyrdur og dømdur, og at hann tí játtaði seg sekan, sjálvt um hann í veruleikanum var ósekur. Í einari sjónvarpssending hevur Thomas Quick sagt, at hann framdi einki av teimum morðunum, sum hann er dømdur fyri. Thomas Quick varð í 1997 dømdur fyri átta morð, sum hann varð sagdur at hava framt í árunum frá 1976 til 1988.

# Tá krimisøgur verða skaldskapur



**Hóast sítt vánaliga umdømi, kann krimisjangran væl brúkast til at skapa góðan skaldskap, staðfestir krimigranskarin Peter Kirkegaard, sum heldur fyrilestur um krimibókmentir í annaðkvøld á Fróðskaparsetrinum**

FYRILESTUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Seinnu árini hava krimisøgur gjørt um seg sum ongantíð fyrr. Tær liggja støðugt á odda á flestu metsølulistum, og nógv bendir á, at bæði krimilesarar og krimihøvundar gerast alsamt fleiri í tali. Kortini eru tað tey, sum tvíhalda um, at krimibókmentir eru lítið annað enn lættisoppabøkur, sum eru líka skjótt gloymdar, sum tær eru lisnar. Veruligan skaldskap kunnu krimisøgur í øllum førum ikki bólkast saman við, verður ofta sagt.

*- Krimisjangran hevur ofta verið í so freistandi hjá høvundum, sum ikki hava neyðugu evnini at skriva hugtakandi søgur, heldur krimiserfrøðingurin Peter Kirkegaard, sum í annaðkvøld heldur fyrilestur um krimibókmentir á Føroyamálsdeildini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Skugga yvir góðu krimisøguna

Tí kann tað kanska eisini undra, at krimisøgur í hesum døgum eru evni hjá lesandi á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum. Tað er krimiserfrøðingurin Peter Kirkegaard ið stendur fyri frálæruni, og í sambandi við sína vitjan sum gestalærari á Setrinum hesar dagarnar, fer hann at halda almennan fyrilestur um krimibókmentir í annaðkvøld.

Sambært Kirkegaard er tað ongin ivi um, at tað finnast óvanliga nógvar vánaligar krimibøkur. Men tað merkir ikki, at øll krimi bókmentagreinin er óbrúkilig. Heldur er tað nógvu vánaligu krimihøvundarnir, sum eru trupulleikin, heldur hann.

- Nógvar av krimibókunum, sum til dømis liggja ovast á metsølulistunum í løtuni, hava lítið at bjóða. Og tað hongur lutvíst saman við, at krimisjangran er freistandi hjá mongum, sum ikki hava neyðugu evnini sum rithøvundar. Nógva uppmerksemið, hesar bøkurnar fáa, skuggar ofta yvir teir krimihøvundar, sum veruliga duga at skriva og sum hava sett sær fyri at fáa meir innihald og skaldskap inn í sínar krimisøgur, sigur Peter Kirkegaard.

### Arne Dahl lyftir støðið

Sum dømi nevnir hann svenska krimihøvundan, Arne Dahl, sum hevur megna at lyft krimibókmentir upp á eitt støði, vit ikki hava sæð leingi.

- Dahl megnar ikki bara at skapa eina fantastiska spennandi søgu. Tað er eisini ein sonn fragd at síggja, hvussu neyva kanningararbeiðið handan søguna verður avloyst av hansara fría og spraklandi skrivikynstri, sigur Kirkegaard, sum í løtuni er við í eini verkætlan um nútíðar norðurlendskar krimibókmentir, har hansara serøki er krimibókmentirnar hjá Arne Dahl.

Sjálvur hevur Peter Kirkegaard granskað og skrivað ein hóp um krimibókmentir, umframt at hann í fleiri ár ummælti krimibøkur í donsku avísini Informatión. Dagliga starvast Peter Kirkegaard sum granskari á deildini fyri samskiftisfrøði á universitetinum í Álborg.

Í fyrilestrinum í annaðkvøld fer hann at tosa um krimibókmentir sum heild, umframt at hann eisini fer at tríva í onkra av bókunum hjá Arne Dahl.

Fyrilesturin, ið er almennur, verður á Føroyamálsdeildini mikukvøldið 22. apríl klokkan 20.

# Eingin oljuboring í summar

**Anne Marie brunnurin verður boraður í februar næsta ár**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Ætlaða oljuboringin á Anne Marie leiðini á føroyska landgrunninum í summar verður av ongum. Hetta er greitt, nú boripallurin Western Phoenix, sum skal bora brunnin, ikki verður tøkur fyrr enn seint út á heystið ella í vetur. Hetta upplýsir Petur Joensen, stjóri í Jarðfeingi fyri Sosialinum. Hann vísir á, at ENI, sum er fyristøðufelag fyri boringini, hevur vent sær til Jarðfeingi og sagt frá hesi seinking. Samtíðis hevur felagið spurt føroysku myndugleikarnar, um tað kann flyta boringina til februar 2010. Hetta tí at tað er bara næstbest at bora um veturin. Petur Joensen sigur, at Jarðfeingi hevur viðgjørt málið og fara tey at játta ENI at flyta boringina nakrar mánaðir. Hetta bæði fyri at fáa optimalt burtur úr og eisini fyri trygdina. Tað gagnar ongum at bora á vetrartíð í hesum harðbalna økinum. Aftrat hesum kemur so lærdómurin, sum fekst burtur úr Williambrunninum hjá BP. Har varð nevniliga borað á vetrartíð, og varð boringin nógv tarnað av veðri.

Stjórin á Jarðfeingi heldur ikki, at henda útsetingin er nakað negativt signal fyri føroyska oljuleiting. –Um borað verður í heyst ella í februar mánað næsta ár kann vera líka mikið. Men sjálvandi er tað keðiligt fyri føroysku veitararnar aftur at skula bíða. Men fyri bæði trygdina og fyri boringina sjálva er best at sleppa undan at bora á vetrartíð sigur Petur Joensen.



*Petur Joensen, stjóri í Jarðfeingi: -Best fyri allar partar ikki at bora um veturin*



*Tað er hesin boripallurin, West Phoenix, sum verður seinkaður til boring á landgrunninum í summar, og sum nú kemur til Føroya í februar ístaðin*